## Kuba inn í hitan

Felagsskapurin hjá londunum í Norður-, Mið- og Suðuramerika samtykti í gjár at geva Kuba limaskap í felagsskapinum. Tað hevur landið ikki havt síðani 1962. AP skrivar, tí øll tey 34 londini í felagsskapinum og harvið eisini USA atkvøddu fyri henni. Politiskir eygleiðarar halda, at USA gjørdi av at taka undir við semjuni fyri at tekkjast fleiri av teimum vinstravendu leiðarunum í Mið- og Suðuramerika. Í hesi støðuni helt USA seg kunna loyva Kuba inn í kuldan uttan at styggja ov mong onnur frá sær, siga teir politisku eygleiðararnir.



## Kvinnur í Landstingið

Ikki færri enn átta av teimum fjúrtan tinglimunum hjá grønlendska flokkinum IA eru kvinnur, og nakrar teirra fingu fleiri persónligar atkvøður enn teir flestu floksfelagarnir. Flestar fekk Maliina Abelsen, sum fekk 1.410 persónligar atkvøður. Hon sigur við grønlendska kringvarpið, at valúrslitið er sera týdningarmikið fyri tær grønlendsku kvinnurnar, tí tað vísir, at veljararnir hava álit á kvinnunum sum politikarum. Tvær aðrar kvinnur, sum fingu nógvar persónligar atkvøður, eru Juliane Henningsen úr IA og Aleqa Hammond úr Siumut.

# Stórur áhugi fyri borgarafundi

**Eini 50 fólk vóru møtt á borgarafundinum, sum Tórshavnar kommuna skipaði fyri í Nólsoy í gjárkvøldið. Fleiri mál vóru umrødd á sera siðiliga fundinum**



*Eini 50 fólk vóru møtt á borgarafundinum í skúlanum í Nólsoy í gjárkvøldið. Fundurin var ógvuliga konstruktivur og siðiligur*

*Mynd: Leo Poulsen*

BORGARAFUNDUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað vóru serliga tvey mál, sum fingu drúgva umrøðu á borgarafundinum í Nólsoy í gjárkvøldið. Ferðasambandið – nýggj Rita – var annað, og vetrarfriðing av bygdini var hitt. Hetta seinna er umrøtt á síðu 2 í blaðnum í dag, og vit venda aftur til ferðasambandið í blaðnum í morgin.

Hesi bæði oman fyri nevndu málini vóru tey fyrstu á skránni.

Næst greiddi havnameistarin, Jónsvein Lamhauge, frá bátaviðurskiftunum í Nólsoy.

Hann upplýsti, at tað eru eini 25 bátapláss fram við keikantinum, og at Nólsoyar havn er einasta havn í kommununi, har ikki øll plássini eru upptikin.

Havnameistarin nevndi, at el-talvur eru settar upp fram við øllum keikantinum, so bátar hava møguleika at fáa landstreym. Hetta er gjørt, síðani havnin í Nólsoy er komin undir Tórshavnar havn.

Eisini er ein nýggj rampa sett upp á molanum í Nólsoy, har Ritan leggur at. Tað hevur annars verið ógjørligt hjá fólki í koyristóli at sleppa umborð á Rituna – annað enn at onkur má hava tikið viðkomandi á ryggin og borið hann umborð. Ikki júst tíðarhóskandi í 2009.

Trupulleikin er sjálvandi, at eingin tilsvarandi rampi er í Havn, so at seta ein upp í Nólsoy, er sjálvandi bert ein hálv loysn.

### Teymarnir halda ikki

Inntil fyri tveimum árum síðani var ein bíðiskúrur á havnalagnum í Nólsoy, har tað bar til hjá fólki at kroka fyri vindi og regni, men tá kunningarstova varð sett á stovn har úti, skemdi hesin skúrurin fyri, og avgjørt varð tí at taka hann niður.

Í fjør varð so eitt buss skýlið sett upp á keiini, vælsaktans í einari góðari meining. Men hesa loysnina halda nólsoyingar lítið um, tí hon ger hvørki til ella frá og lívir bert, um ættin liggur beint inn á baksíðuna á skýlinum, sum bert er hálvan metur djúpt.

Borgarstjórin helt kortini fyri, at ein bíðiskúrur fór neyvan at koppa kommununi fíggjarliga, og at ein loysn tí lættliga kundi finnast á tí trupulleikanum.

Eitt annað, sum var ført fram í hesum sambandi var, at teymarnir, sum Tórshavnar havn hevur lagt út í Nólsoy, als ikki megna at halda bátunum. Eitt tíðarskeið høvdu hesir virka eftir ætlan, men so flutti Tórshavnar havn teymarnar aftur, og ein báteaigari pástóð, at hann nú mátti skjútsast, skuldi hann umborð á 8-mannafarið hjá sær!

Í hesum sambandi var eisini nevnt, at kannað átti verið eftir, um bátabrúgvar hevði verið ein loysn. Ført varð fram, at fleiri av bátaeigarunum er komnir væl til árs, og at tað tí hevði verið ein stór hjálp hjá teimum, um bátarnir kundu ligið við bátabrúgvar heldur enn fyri teym.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, lovaði at kanna prís, og hvussu ein møgulig bátabrúgv kundi leggjast.

### Trupulleikin við útstykking

Eitt annað mál, sum hevur tikið sína rúmu tíð, er nógv umrødda útstykkingin eystanvert barnagarðin í Nólsoy.

Longu tá Nólsoyar og Tórshavnar kommunur løgdu saman 1. januar 2005 var klárt at stykkja út grundstykkir í Nólsoy. Vegaskapilsi var longu tá gjørt, og tað tóktist bara vera ein avgreiðsluspurningur at sundurmatrikulera grundstykkini. Men nústaðni, fýra og eitt hálvt ár seinni, er klárt at fara undir at gera stykkini byggiklár.

Men nú er støðan hon, at eingin fær fígging at ogna sær eitt so lutfalsliga dýrt grundstykki. Hetta skal jú síggjast í ljósinum av, at seinastu grundstykkini í oynni kostaðu 20.000 krónur at keypa. Nú kosta tey væl omanfyri 300.000.

Tað, at tað hevur drigið so langt út, hevur gjørt, at flestu av teimum, sum stóðu á bíðilista fyri tveimum, trimum árum síðani, nú hava funnið aðrar loysnir. Summar familjur eru enntá flutt av oynni.

Við í stóru útstykkingini hjá Tórshavnar kommunu er eisini ein ætlan um randarhús, og hóast henda ætlan fyri tveimum árum síðani – á seinasta borgarafundi – ikki fekk nakra undirtøku millum fólk, so eru tíðirnar nú soleiðis, at hetta kanska hevði verið ein loysn, sum fólk hava ráð til.

Borgarstjórin lovaði at taka hesa ætlan fram aftur, tí hon liggur fyri so vítt púra klár at far undir.

At enda greiddi brandmeistarin, Kartni Jacobsen, frá brandtilbúgvingini í Nólsoy. Liðið hevur fingið ein brandbil, og somuleiðis eru nú øll í sløkkiliðnum í Nólsoy útbúgvin við brandskeiði og fyrstuhjálpar skeiði.



*Ein nýggj rampa er sett upp á molanum í Nólsoy, so fólk í koyristóli kunnu koyra umborð á Rituna. Men loysnin er bara hálv, tí ikki ber til at koyra í land í Havn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*